Álit

í

løgtingsmáli nr. 87/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum (Heimild at býta upp embætisuppgávur millum próstar)

Sirið Stenberg, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum, hevur lagt málið fram 24. mars 2023, og eftir 1. viðgerð tann 27. mars 2023 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. og 26. apríl 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Føroya Stiftsstjórn saman við biskupi, Prestafelag Føroya og landsstýrismannin í almanna- og mentamálum.

Biskupur og Prestafelag Føroya eru á einum máli um, at broytingin er neyðug. Ov nógvar uppgávur liggja í dag á dómpróstinum, ið einsamallur hevur ábyrgd av stórum umsitingarligum og fíggjarligum økjum. Tí er ætlanin at flyta nakrar av umsitingarligu uppgávunum til ein prást at røkja. Nýggi prósturin skal finnast millum verandi sóknarprestar, men talan er ikki um eitt fulltíðarstarv. Viðkomandi røkir nýggju uppgávunar, umframt sítt verandi starv sum sóknarprestur.

Í stóran mun eru tað starvsfólka- og umsitingaruppgávur, sum nýggi prósturin skal røkja.

Talan er í stóran mun um eina tillaging í mun til skipanina, sum hon er í dag.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 28. apríl 2023

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Erling Eidesgaard
Magnus Rasmussen	Liljan Weihe	Súsanna Bertholdsen
	Bárður á Lakjuni	